# Stórstu profilarnir 09

UPPGÁVAN AT VELJA **10 TEIR STØRSTU PROFILARNAR Í FØROYSKUM FÓTBÓLTI** ER ALT ANNAÐ ENN LØTT. TAÐ VELDST JÚ UM, HVØRJI KRITERIUM VERÐA NÝTT Í ÚTVELJINGINI. FYRI AT LÆTTA UM ÚTVELJINGINA – OG FYRI AT EINKI LIÐ SKAL SETAST EFTIR – HAVI EG VALT AT TAKA EIN SPÆLARA ÚR HVØRJUM LIÐI, OG SO KUNNU FÓLK VERA SAMD ELLA ÓSAMD Í TEIMUM GRUNDGEVINGUM, SUM LIGGJA HANDAN VALIÐ.

**LAGT TIL RÆTTIS:** jákup Mørk, jakup@sosialurin.fo · **MYNDIR:** Álvur Haraldsen



1

HB

## Fróði Benjaminsen

Við heitinum sum ársins leikari er sjálvsagt, at Fróði Benjaminsen er størsti profilurin hjá HB. Miðvallargeneralurin hevur í fleiri ár prógvað, at hann er ein tann mest kompletti spælarin í føroyskum fótbólti við bæði tekniskum og fysiskum dygdum. Serstakliga tí hann hevur framúr dygdir bæði fram- og aftureftir vøllinum, og sum box-til-box spælari eru hansara evni framúr. Nakað sum føroyska landsliðið eisini hevur havt alstóra gleði av.



3

VÍKINGUR

## Andreas Lava Olsen

Tað sigur ikki so lítið, at Andreas verður valdur sum stóri profilurin á einum liði, sum eisini telur Súna Olsen, sum í mong ár hevur talst millum fremstu føroysku fótbóltsspælararnar. Lava-maðurin hevur tó fram um alt nakrar dygdir, sum vit ikki hava sæð í føroyskum fótbólti, síðani Todi Jónsson var upp á tað besta. Vantandi fótbóltsliga uppalingin ger hann til ein óortodoksan álopsspælari, sum altíð er førur fyri at gera tað óvæntaða, og eksplosiva antrittið er snøgt sagt í altjóða flokki.



2

EB/STREYMUR

## Arnbjørn Hansen

Hóast ein formniðurgongd og argandi skaðar fyrra partin av kappingarárinum høvdu við sær, at EB/Streymur ongan tíð kom heilt fram í oddin í ár, so er Arnbjørn Hansen sterkasta kortið hjá tvífaldu silvurvinnarunum. Evnini at standa á rætta stað til røttu tíð eru framúr, og seinasta partin av kappingarárinum rann Arnbjørn upp eftir máltindunum, tó at hann ikki rakk heilt á toppin í ár. Hevur hartil framúr styrki í luftspælinum, og tað var nakað, sum litavar eisini máttu sanna, tá teir máttu nakkalangir av Svangaskarði.

NSÍ

## Bogi Løkin

Hóast hann ikki altíð er tann spælarin, ið tú best leggur ti merkis, so er Bogi ein ómetaliga týðandi partur av liðnum hjá NSÍ – og fyri tað eisini føroyska landsliðnum. Hevur sera gott bóltskil, og kemur sær tí sjáldan í óføri. Tekniskt telist hann millum teir heilt frægu í føroyskum fótbólti, og tá tað ræður um arbeiðsøki, er neyvan nakar, sum rennur fleiri kilometrar enn hann ígjøgnum ein dyst. Tí røktar hann eitt sera stórt arbeiðsøki í verjupartinum, eins og hann nærum altíð er við frammi í álopinum, tá møtstøðumálið skal hóttast.

4

